## Virðisgrundarlagið hjá NSR:

Serkunnleiki og siðalæra eru grundarsteinar undir námsfrøðiligum og sálarfrøðiligum arbeiði.

Menning av teimum náms– og sálarfrøðiligu háttunum eru ein fyritreyt fyri framhaldandi góðsku, tá ið tað ræður um at loysa uppgávur.

Vit leggja dent á tvørfakliga tillagað tilboð og royna at finna loysnir burtur úr tí orku, sum sprettir fram, tá ið ymsir fakbólkar møtast um eitthvørt arbeiði.

Vit arbeiða út frá felags reiðiligheit og felags virðing í samstarvi okkara við teir ymisku partarnar, tá ið tað ræður um at loysa trupulleikar.

Taka støði í tí tillagingartilboðnum, sum longu hevur verið sett í verk.

Taka altíð støði í menningarmøguleikunum heldur enn í trupulleikunum. Øll børn hava møguleika at menna seg, og hava rætt til at fáa ment síni persónligu evni og sínar gávur til best møguligar persónligar og sosialar førleikar.

Barnið og sambandið við umhvørvi tess, er miðdepilin í arbeiðinum.

Barnið er viðspælari í sínum egna lívi. Lyklaorðið er, at barnið gerst sjálvstøðugt.

Foreldrini eru virknir samstarvsfelagar, tá ið tað ræður um at loysa trupulleikarnar.

Allir partar, sum eru við í tilgongdini, eru ein styrki, og vit leggja dent á, at hesi eiga at merkja, hvørjir av teirra háttum at arbeiða í

## Hesir stovnar eru umfataðir av NSR Suður:

Sumbiar skúli
Vágs skúli
Dagrøktin í Vági
Barnagarðurin Eikilund
Frítíðarskúlin í Vági
Porkeris skúli
Dagrøktin í Porkeri
Hovs skúli
Fámjins skúli
Tvøroyrar skúli
Dagrøktin á Tvøroyri
Barnagarðurin Mýrifípan
Frítíðarskúlin í Trongisvági
Hvalbiar skúli
Sandvíkar skúli

Harafturat samstarvar NSR Suður við heilsumyndugleikarnar í oynni.


**NSR Suður**

Vágsvegur 89
Postboks 1
FO-910 Vági

Tel. +298 30 87 70
Fax + 298 30 87 78
nsr@nsrsudur.fo


# NSR Suður

náms- og sálarfrøðilig ráðgeving




**NSR Suður**
**Vágsvegur 89**
**Postboks 1**
**910 Vági**


**Avgreiðsla:**
**Mánadag—tórsdag kl. 9.00—15.00**
**Fríggjadag kl. 9.00 –14.00**


**Tlf.: + 298 308770**
**Fax: + 298 308778**

**Teldupostur: nsr@nsrsudur.fo**

# NSR Suður
**náms- og sálarfrøðilig ráðgeving**

NSR Suður er onnur av teimum ætlaðu fimm NSR-tænastunum í landinnum. Hetta er liður í broytingarætlanini á náms– og sálarfrøðiliga økinum, sum Mentamálaráðið setti skjøtil á í 2006.

Til tess at kunna veita eina munabetri tænastu á náms– og sálarfrøðiliga økinum hava kommunurnar í Suðuroynni, saman við Sernámsdeplinum og Mentamálaráðnum, sett á stovn NSR-tænastuna í Vági.

**Starvsfólkini á NSR Suður:**

**Sakaris Dimon, samskipari**

sakaris@nsrsudur.fo

**Rakul í Gerðinum, skrivstovufólk**

rakul@nsrsudur.fo

**Magnus Hansen, sálarfrøðingur**

magnus@nsrsudur.fo

**Maud Benjardøgg, ráðgevari**

maud@nsrsudur.fo

**Sylvia Poulsen, ráðgevari**



## Hvat er NSR Suður?

NSR-tænastan í Vági er partur av tænastuni hjá Sernámsdeplinum og tekur lut í menningini av náms– og sálarfrøðiliga virkseminum sum heild. Í samstarvi við Sernámsdepilin virkar hon sum sjálvstøðug eind.

## Málbólkur:

Børn og ung við serligum tørvi í aldrinum 0-18 ár.

## Uppgávurnar hjá NSR Suður:

- At ráðgeva og vegleiða skúlum, stovnum, dagrøktarum og heilsufrøðingum.
- Ráðgeva og vegleiða børnum og foreldrum.
- Gera heildarætlanir fyri hvørt einstakt barn, soleiðis at øll tiltøk og allar atgerðir vera samskipaðar.
- At skipa fyri skeiðum fyri námsfrøðingar, lærarar og námsfrøðiligar stuðlar.
- Samskipa og menna náms– og sálarfrøðiligu ráðgevingina á stovnum/skúlum sum heild.
- Veita anonyma ráðgeving.
- Hava samskifti og samstarv við skúlaverk, almannaverk og sosialar myndugleikar.

**Mannagongdir,** tá eitt mál verður tilmeldað:

**Hvør kann tilmelda eitt mál til NSR?**

- Leiðarin á stovni/skúla
- Heilsumyndugleikar
- Foreldur
- Børn/næmingar

**Hvør skal altíð góðkenna tilmeldingina?**

- Foreldur/verji

**Hvussu, og hvat skal upplýsast?**

- Tilmeldingarblað skal útfyllast (fæst frá NSR)
- Hvørjar trupulleikar hevur barnið?
- Hvussu vísa trupulleikarnir seg?
- Hvat hevur stovnurin/skúlin roynt til tess at bøta um trupulleikarnar hjá barninum?
- Hvussu heldur skúlin/stovnurin at trupulleikarnir ávirka barnsins uppliving av egnari støðu/ sjálvsvirðing?
- Hvørjar sterkar síður hevur barnið?
- Hvussu hava foreldrini verið tikin við í royndini at bøta um trupulleikarnar hjá barninum?
- Aðrir týðandi upplýsingar

Allir týðandi spurningar á tilmeldingarblaðnum mugu vera svaraðir, áðrenn tilmeldingin kann viðgerðast.

**Hvat hendir, tá málið kemur til NSR?**

- NSR metir um tørv á námsfrøðiligum stuðuli
- NSR metir um tørv á sálarfrøðiligari hjálp
- NSR metir um vav og slag av serundirvísing, ið talan kann verða um
- NSR gevur stovns-/ skúlaleiðarum og foreldrum uppskot um, hvussu ein kundi bøtt um trupulleikarnar hjá barninum/næminginum

